**Byggisamtyktarásetingar fyri økið í Krabbaurð**




**Galdandi ásetingar fyri øki D á havnalagnum:**

a) Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
b) Byggingarstigið fyri havnaøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.
c) Rúmmát av húsinum má ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.
d) Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 10 m yvir liðugt kajdekk (miðal við húsahornini).
e) Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri markið enn 5 m, minsti fráleiki millum bygningar 10 m.
f) Á hesum økinum er ikki loyvt at innrætta bústaðir.
g) Bygdaráðið kann tó geva loyvi til, at partur av eini bygging kann verða hægri enn teir ásettu 10 m, eitt nú tekniskur útbúnaður ella líknandi. Hetta er galdani fyri øll D økini uttan D3.
h) Økini verða løgd burturav til fergulegu og bilstøðlar.
i) Útstykking kann ikki fara fram

**Uppskot til ásetingar fyri, G2 – Neystaøkið í Krabburð**

a) Økið verður nýtt til neyst og smátt havnarlagsvirksemi í hesum sambandi, somuleiðis kunnu neystini nýtast til frítíðarbústað.
b) Bygging ella nýtslutillaging á verandi neystaognum og matriklum, kann bert fara fram í samráð og eftir ætlan ið byggimyndugleikin frammanundan hevur góðkent.
c) Neystini skulu standa lið um lið, sum neyst og neystaøkir í øldir hava verið hátta – við skjøldrum vendum móti sjónum eins og verandi venda í dag.
d) Neyðugar gøtur kunnu tó verða gjørdar neystanna millum.
e) Neystatekjurnar skulu verða reistar við 'triðingsreyst' uml. 42gr – biðjast kann um frávik innan karmin, 30 – 50 gr, um triðingsreising ikki er møgulig byggitøkniliga, ella av aðrari fakgrundaðari orsøk.
f) Neystini og neystaøki í síni heild, skulu verða háttað eins í litið, úttrykki og tilfari - eftir heildarætlan ið byggimyndugleikin frammanundan hevur góðkent.
g) Byggihæddin verður ásett eftir lidnum lendi frammanfyri neystini, og má í mesta lagi vera 6m til yvirgrind og 7,8 til mønu.
h) Víddin á neystunum kann í mesta lagi vera 4x10m, og ongantíð størri enn einstaka stykkið loyvir.
i) Svalar móti sjósíðu, skulu verða frítthangandi (ongar súlur) og ikki hóra meiri enn 1,5m útyvir, við eini min. fríhædd á 2,3m.
   Síðufrástøðan móti grannaogn skal í minsta lagi vera ½ av tí ið svalin hórar framúr bygginigini.
j) Viðvíkjandi parkeringsviðurskiftum í samband við nýtslu av neystunum verður víst til almennu parkeringsøkini í Toftatúni.